# SøluRásin 2001




1. Heiðabúðin
2. Tempur
3. Intech
4. Opus
5. Hjá Sanni
6. Reyni Service
7. Gastrolux
8. Hansen
9. Deild C
10. Super dekk
11. Gáski-bátakeyp
12. Fandango
13. Fútastova
14. Jallur
15. Hjá Anfinni
16. Tubbaksverndarfelagið
17. Gardinbúðin
18. Stásið
19. Josi
20. Diana
21. Sølurásin
22. Innkast Ítróttarútgerð
23. Skóbúðin v/E.K.
24. Frú S
25. Hallo
26. Teldu Tænastan
27. Jungmann
28. Leikabúðin
29. Palettin
30. Shop Inn




## Skráin

**Leygardagin 3. november**

Kl. 15.00 SøluRásin 2001 letur upp
Kl. 15.45 Asbjørn Mikkelsen setur stevnuna
Kl. 16.00 Klovnar sum ganda og búktalari
Kl. 18.00 Mótasýning
Kl. 18.30 Gandakallur og búktalari
Kl. 20.00 Mótasýning
Kl. 21.00 Ragnar í Vík syngur á pallinum
Kl. 21.30 Drigið verður millum seldu atgongumerkini
Kl. 22.00 Stevnan letur aftur

**Sunnudagin 4. november**

Kl. 15.00 SøluRásin 2001 letur upp
Kl. 16.00 Eg eri ein "K" — barnakór
Kl. 17.00 Mótasýning
Kl. 17.30 Vørutombola í bygdasalinum
Kl. 19.00 Ragnar í Vík syngur á pallinum
Kl. 20.00 Mótasýning
Kl. 21.00 Jónsvein og Birgir syngja á pallinum
Kl. 21.30 Drigið verður millum seldu atgongumerkini
Kl. 21.45 SøluRásin 2001 letur aftur

ítróttur

Nr. 211 • hósdagur • 1. november 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kollfirðingur ger um seg í Spania

**18 ára gamli Hans Kristian Simonsen — sum fyrr í ár sensationelt vann á Garry Kasparov í simultantalvi — telvar sum ein komandi føroyameistari í HM í Spania fyri dreingir 18 ár og yngri**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Hans Kristian Simonsen hevur fingið nógv fleiri stig enn roknað varð við í HM kapping í Spania*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Níggju umfør eru leikt, og hevur Hans Kristian hálvtfimta stig, sum er væl omanfyi væntaðu skoruna.

Hans Kristian er nevnliga styrkismettur sum nummar 79 av 83 luttakarum og hevur bert møtt nógv sterkari mótstøðu. Allir mótstøðumennirnir hava havt millum 2100-2350 í rating, og tískil er úrslitið hjá Hans Kristian óvanliga gott.

Tvey umfør resta í og ungi kollfirðingurin liggur í løtuni á einum sera flottum deildum 34. plássi, saman við eitt nú besta danska umboðinum undir 18 ár, Christian K. Petersen.

Nógvir stórmeistarar og altjóða meistarar eru millum hesar ungu telvarar, og megnar Hans Kristian at vinna sítt talv í tíggjunda umfari ímóti sterkum spániumanni (2275 rating), møtir han møguligum einum tittul-telvara í seinasta umfarinum.

Tá Hans Kristian kemur heim úr Suðurevropa, fær hann ivaleyst úr at gera á 1. borði hjá kollfirðingum. Leysasøgur siga at Hans Kristian møguliga ætlar sær at telva við vestmenningum, men neyvan er hald í søguni.

## Talvið hesa vikuna

**Ólavur Simonsen (2214, altjóð rating) - Hrannar Baldursson (2129)**
**Reykjavik, 6. Umfar, 2001**

1.a3!? (Ikki ein sunnur pedagogiskur leikur, tá vit í okkara fyrstu talvárum lærdi um sentrum í byrjanarspælinum) 1...g6 2.Ric3 Bg7 3.d4 c5 4.Be3 (Ólavur er í serligum talvhýri við enn einum sera óvanligum byrjanarleiki) 4...Fb6 5.Rid5 Fc6 6.dxc5 Bxb2 7.Rb1 Bg7 8.Bd4 e5 9.Bc3 Ria6 10.e4 Rixc5 11.Bb4 b6 12.Bb5!



(Nú byrjar at líkjast onkrum. Ólavur hevur fingið góða útvikling fyri finnuna) 12...Fd6 (Fxb5?? 13. Ric7+) 13.Bxc5 bxc5 14.Bc4 Kf8 15.Fd3 Rb8 16.Rb3 Rxb3 17.Fxb3 f6? (f5 hevði helst verið betur, meira aktivt spæl sum er neyðugt í hesari støðu. Svartur hevur trupulleikar at útvikla fólkini) 18.Rie2 Rie7 19.Rixe7 Kxe7 20.Ric3 (Sjálvandi, d5 punktið aftur til riddaran) 20...Rd8 21.0-0 Ba6 22.Rid5+ Kf8 23.Rb1 Bxc4 24.Fxc4 Fc6 25.Rb5 Rc8 26.g3 f5 27.f3 Bh6 28.Ra5 Fb7 29.Kg2 fxe4 30.fxe4 d6 31.Fa4! c4? (Ra8 er einasti leikur, men tað tapur eisini spakuliga) 32.Rxa7 Fb1 33.Fd7 (og Ólavur mátar íslendaran innan fáar leikir) 1-0

## Tungt stríð í Íslandi

**Klaksvíkingurin Ólavur Simonsen hevur ikki eydnuna við sær í opnu kappingini Johann Thorir Jonsson Memorial í Reykjavík í hesum døgum**

TALV
*Eyðun Klakstein*

Sjey umfør eru leikt og tvey stig hevur Ólavur higartil fingið, sum gevur eitt 38. pláss av 42 luttakararum.

Úrslitið er væl undir væntaðu skoruna, men enn resta trý umfør og tískil kann Ólavur enn bjarga úrslitinum hjá sær.

Fýra ferðir hevur mótstøðan verið nakað sterkari og hevur Ólavur eisini tapt hesi talv. Tvey stig hevur hann fingið ímóti trimum lægri rataðum telvarum. Eitt av hesum talvunum leikti Ólavur a3 í fyrsta leiki (!), og eydnaðist tað eisini honum at vinna hetta merkisverda talv, sum er við í blaðnum í dag.

Vónandi kann klaksvíkingurin reisa seg í endaspurtinum, og eftir hendan vendir hann eyguni heimaftur, har hann júst nær at koma heim til toppdystin í 1. deild ímóti Havnini sunnudagin 4. november.

Tann vælkendi Ivan Sokolov og fremsti íslendski telvarin Hannes H. Stefansson, eru á odda við hálvumsætta stigi. Á øðrum plássi finna vit fremsta danska telvaran í løtuni, Peter Heinie Nielsen, hollendaran Jan Timman og Svian Johnny Hector við fimm stigum hvør.

## Ungir mans til Nottingham Forest

**Tveir ungir HB'arar og ein B36'ari fara sunnudagin til enska felagið Nottingham Forest at venja í eina viku**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Eli Thorsteinsson, Rókur Jespersen og Bergur Midjord fara sunnudagin til Onglands, har teir skulu vitja í kendum fótbóltsfelagi í átta dagar.

Talan er um Nottingham Forest, sum hevur boðið føroysku spælarunum yvir at vitja.

Eli Thorsteinsson og Rókur Jespersen eru báðir úr HB, og teir hava báðir spælt á U17 og U19 landsliðunum hjá FSF. Bergur Midjord er úr B36.

Tað er North Atlantic Football Agency, sum stendur fyri ferðini hjá ungu spælarunum.

– Teir fara at venja og spæla onkran dyst í Nottingham. Endamálið við ferðini er, at teir fáa eina hóming av, hvussu alt gongur fyri seg í einum slíkum stórum felagi í Onglandi, sigur Jákup í Stórustovu.

Eli Thorsteinsson og Rókur Jespersen eru í hesum døgum á fótbóltsskúlanum Hessel Gods í Danmark.

## Heini sigraði

Heini Olsen og Heini Danielsen luttóku í vikuskiftiskapping í Espegærde seinast í farna mánaða. Heini Olsen, sum hevur havt eitt talvár væl undir miðal, vann kappingina sera trygt. Honum eydnaðist at fáa hálvtfimta stig av fimm møguligum, har hann hav hálva stigið til Heina Danielsen, sum eisini hevði eina góða kapping við sínum hálvum fjórða stigi og øðrum plássi. Tvey góð úrslit sæð við føroyskum eygum.

## Torbjørn vann

Kollfirðingurin Torbjørn Thomsen hevur telvað við vestmenningum seinastu tvey árini. Í heyst luttók hann í innanfelagskapping teirra, sum var vælmannað av royndum sum óroyndum telvarum. Tjúgu telvarar luttóku.

Torbjørn vann kappingina ruddiliga við hálvumníggjunda stigi av níggju møguligum, har bert tann roynd John Jacobsen fekk tikið hálvt stig frá kjempuni úr Kollafirði.

**Toppurin:**

| | |
|---|---|
| Torbjørn Thomsen | 8,5 |
| Kári O. Durhuus | 7 |
| John Jacobsen | 6,5 |
| Petur Højgaard | 6,5 |
| Jákup Andreasen | 6 |
| Jón Mikkelsen | 5,5 |
| Fróði Skúvadal | 5 |

## FM 2002 verður í Sandavági

Nevndin í Talvsamband Føroyum hevur kunngjørt, at komandi føroyameistaraskapurin fyri einstaklingar verður leiktur í Sandavági. Seinast FM var í Vágunum var í 1984 tá telvað var í skúlanum í Giljanesi. Tá vann tann bert 20 ára gamli Torkil Nielsen FM fyri fyrstu ferð.

Vit ynskja Gutta Petersen og hansara monnum í Sandavágs Talvfelag góðan byr við FM-fyrireikingunum.